

# Montørur til FT Samskifti

**Hevur tú tekniskt innlit bæði í tele- og datatøkni, og hevur tú áhuga fyri góðari kundarøkt? So er tað júst tær, vit leita eftir.**

**Søkt verður eftir montøri til Tænastudepilin á FT Samskifti í Tórshavn at byrja skjótast gjørligt.**

Sum montørur hjá FT Samskifti verður tú ímyndin úteftir mótvegis okkara kundum. Tú fært ábyrgd av, at telefon- og internetútgerð, sum kundin hevur ognað sær, virkar. Montørarnir ráðgeva eisini kundunum í mun til ta útgerð og tær tænastur, ið kundin hevur keypt. Tú verður partur av okkara vælvirkandi montørtoymi og fært ein gerandisdag í einum spennandi arbeiðsumhvørvi, har avbjóðandi arbeiðsuppgávur eru, bæði sjálvstøðugt og saman við dugnaligum starvsfeløgum. Góðir møguleikar eru fyri at menna teg bæði persónliga og fakliga.

**Arbeiðsøkið fevnir um uppsetan, viðlíkahald og brekrætting av:**
- Internet, ISDN og ADSL
- Telefoninnleggingum
- Vekslarum
- Innanhýsis kaðalskipanum
- Terminalum av ymiskum slagi

**Vit ímynda okkum, at tann, ið settur verður:**
- Kann arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og dugir væl at samstarva og samskifta við viðskiftafólk
- Er útbúgvin elektronikkmekanikari, elektrikari, hevur líknandi útbúgving og/ella viðkomandi royndir

Arbeitt verður út frá høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Hoyvík. Arbeitt verður í Tórshavn, Norðstreymoy, Vágum og Sandoy. Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Áhugað kunnu venda sær til Bjørn M. Mortensen, bólkaleiðara, ella Elisabeth Carlsson, depilsleiðara, á tel. 303030. Umsóknir skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 8. mai 2008 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

sansir.fo

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE



# 76 døgn á havinum

**Shell bjóðar tær, tínum reiðaríi og tínari skipsmanning til eitt spennandi, ókeypis tiltak á Hotel Føroyum hóskvøldið 1. mai kl. 19.00.**

**Steven Callahan – 76 døgn í bjargingarbáti**
Í tøttum samstarvi við Trygdarmiðstøðina í Klaksvík, hevur tað eydnast okkum at fingið fatur á kenda amerikanska ævintýraranum og rithøvundanum Steven Callahan. Steven bleiv serliga kendur, tá seglskipið, ið hann sjálvur bygdi, forlisti við Kanarisku Oyggjarnar í 1982. Í lítlum bjargingarbáti rak hann í samfull 76 døg tvørtur um Atlantshavið.

Hann var fleiri ferðir við at geva skarvin yvir, men við einum áhaldandi treiskni og einum vilja av stáli, megnaði hann at yvirliva. Steven varð tikin upp av Karibiskum fiskimonnum.

**Hans Eli Hansen – lagnutúrurin hjá Dart**
Umframt hendan spennandi fyrilestur, fer Hans Eli Hansen úr Klaksvík, eisini at siga frá hendingini, ið sluppin Dart var úti fyri fyrst í 1900. Nakrir ungir norðoyingar fóru til Vestmanna eftir sluppini, men tá teir komu á Borðoyarnes, koma teir í ódnarveður.

**Skráin**
**Kl. 19.00** Føroya Shell bjóðar vælkomin
**Kl. 19.15** Hans Eli Hansen sigur frá
**Kl. 20.00** Lítil steðgur
**Kl. 20.15** Steven Callahan sigur frá
**Kl. 21.30** Liðugt

Tiltakið verður fyri allar skipakundar hjá Shell, og kunnu teir melda seg til tiltakið við at ringja 347412 ella við at senda ein t-post til shell@shell.fo. Avmarkað atgongd.

Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo